# Meðan øldin gleppur okkum av hondum



20. øld prógvaði at kommunisman, hóast teoriin er góð, so kann hendan ikki nýtast av jarðbúgvum. Tað eru vit alt og sjálvsøkin til. Klassasamfelagið kann ikki útruddast. 21. øld skal fylla holið eftir kommunismuna.

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Sosialurin, Hamborg: Í skrivandi løtu eru bara tveir dagar eftir til ártúsundskiftið. Uttanfyri hoyrist okkurt knallið frá kinesarum og øðrum sum skítur. Hásar rakettir toga seg upp í tokuna. Her er Nacht und Nebel. Nátt og mjørki. Og hví seti eg meg so at skriva hesa allarseinastu greinina hesumegin ár 2000. Eg veit ikki sjálvur, havi hugin, men dugi ikki rættuliga at síggja gøtuna fram til seinasta punktum. Tankarnir eru so fløktir av at siga farvæl til gomlu og góðan dag til nýggju øldina. Havi hugsað nógv um orðið nítjanhundrað seinastu dagarnar og kenni eitt sindur av sorgblídni at siga hesum viðkomandi tali farvæl. Sjálvur eri eg føddur í 1957 og hvørt einasta ár sum eg higartil havi livað hevur okkurt við 19 at gera. Men í ovurmorgin, so er hetta liðugt. Og ferdugt við tí. Næstu ferð eg hitti talið nítjan í einum árstali er um nítjan ár, tá skriva vit 2019 og tá stundi eg til tey trýss, verður lív og heilsa.

Vit siga tí best dokumenteraðu øldini nakrantíð farvæl og vit eru helst teir fyrstu føroyingarnir, sum nakrantí hava trinið inn í eitt nýtt ártúsund og hava vitað um tað. Eg haldi so má vera. Prestar og søgumenn heima eru ikki heilt samdir, men Føroyar eru kristnaðar um hetta mundi fyri 1000 árum síðan. Ár 2000 er bara túsundaldarskiftið fyri tey sum ganga eftir okkara rómverska kalendara, ella eftir tí gregorianska kalendaranum. Neyvan hava heidnu føroyingarnir seinasta túsundaldarskiftið, sum við makt og snildni vóru tvingaðir at avnokta teir norrønu gudarnar og at trúgva á Hvíta Krist, tvingaðir av undirbrotligum sambandssinnaðum skúvingum, norskum lakajum, verið greiðir yvir at samstundis, so hátíðar-hildu fólk niðri í Europa, at nú vóru 1000 ár liðin síðan Frelsarin varð føddur. Vit siga tí best dokumenteraðu øldini nakrantíð farvæl. Mitt í seinastu øld kom myndatólið fram, og so at siga hvør einasta hending av týdningi hesa øldina er fast løst á myndum til eftirtíðina. Ein stórur partur av kendum persónum finnast eisini á ljóðbandi og á filmi ella sjónbandi. Tað verður ikki so torført hjá siðsøgurithøvundum í Føroyum í komandi øld at finna myndatilfar og at endurgeva rætt eftir bondum.

Nú knallaði aftur ein kinesari uttanfyri. Stuttligt við týskarum. Lógin sigur, at onki fýrverkarí má verða selt fytt enn tann 29. desember og so verður heldur einki selt fyrr enn ásetta dagin. Ikki sum í Føroyum, har sama áseting er galdandi. Har hoyrir tú um teir fyrstu skaðarnar av fýrverkarí langt fyri jól. Tað tykist einki mark vera fyri, at føroyskir handilsmenn bróta lógina, tá teir tevja vinning fyri framman. Týskarar halda seg til lógina og sjálvur havi eg aftur hildið á einum kinesara í dag, einum rættuligum kinesara, við fjúsi og tí heila. Hetta havi eg ikki gjørt síðan eg var hálvvaksin í Oyndarfirði. Og tað var ein deilig kensla. At seta eld í eina bumbu, bíða spentur eftir brestinum og síðan kenna angandi roykin av krúti.

Barnið vaknaði í mær aftur. Eg var garvillur við fýrverkarí, tá ið eg var smádrongur. Vit skutu og skutu og skutu. Tað var ikki eitt lyklarhol í úthurðunum í Oyndarfirði, sum ikki var meir ella minnið meislað av kinesarum. Vit sleptu kinesarum niður í rør,vit grovu teir niður og vit royndu okkum í vatni. Einaferð var eg so óheppin, at ein kinesari gekk av innundir hurðina í einum kjallara Í Oyndarfirði. Innanfyri stóð ein kviðin kúgv. Kinesarin brast og kúgvin gjørdist so kløkk, at neyðugt var at loysa hana og sleppa henni út eina løtu í kavan og frostið, til friður aftur kom yvir hana. Annars hevði hon hongt seg í ketuni. Sjálvur var eg keddur av hesi hending, ikki ætlaði eg, at leikur skuldi enda soleiðis. Eina aðruferð gekk ein rakett av inni í Víkum. Tí hugnaliga handlinum, sum tíverri brendi í grund fyrst í sjeytiárunum. Rakettin drønaði rund millum stúttur, liting, innpakningspappír, hárnet, vaniljusukur, petroleumspumpu, fýrverkarígoymslu, hattin á fitta handils-mannininum Petur Klein og gav upp anda undir trappuni niðan á mjøl-stovuna og uttan at seta eld á nakað sum helst av øllum tí eldfima, sum kannst inni i hesum deiliga handli. Vit smádrongir stóðu sum Kánus uttanfyri skivuna. Ongin visti rættuliga hvussu alt var byrjað. Í úthurðini í Vikahandlinum var ein hol, og í hesum holi var loyvt at bresta kinesarar. Holið víðkaðist eitt sindur hvørt árið, men gott tilfar var í Víkahandlinum. Tað vóru ikki kinesarar, sum beindu fyri handlunum, men rættuligi eldurin seinni. Í dansistovuni, sum ikki stendur uppi longur, var mangan gangur á nýggjárinum. Dansistovan var ómálað, innan hon var klødd við ógvuliga kvistutum viði. Fleiri staðir vóru kvistarnir dottnir úr og í holunum, sum eftir stóðu, brestu vit kine-sarar. Eitt av hesum var serliga populert. Her hevði onkur jassur telgt formarnar av eini naknari blómandi kvinnu rundanum holið og so meislaðu vit hesa neyð-ars Madonnu á hvørjum ári við dukkufretum og sterk-ari kinesarum, tó ongantíð bumbum. Gentlemenn vóru vit hóast alt.

Og kanska eru kinesararnir eitt úrslit av tíðini, hóast teir nú hava verið bannaði í Føroyum í mong ár. Vit siga eini øld farvæl, eini øld, sum hvat harðskapi víðvíkur hevur verið tann rásta í mannasøguni. Myndin sýnir tveir menn tveita bumbur eftir russis-kum tanksum í Berlin í 1953. Eitt verkfall elvdi til rættuligan harðskap og Reyði Herurin bardi tað niður. Verk-fallsmenninir vildu hava betri kor og síð-an vildu teir av við her-set-ingarvaldið.

Lærdu vit einki av seinastu øld? Søgan endur-tekur seg. Bumburnar regna í Grozsny, russisk tanks eru aftur at síggja og fyrr í ár garteraðu teir sameindu niðri á Balkan.

Týskarar óttast fram-tíðina. Teir vórðu sjálvir atvoldin til tvey heimskríggj í farnu øld og nú bera teir ótta fyri russum fyri eystan. Teir vita, at ein svong stórmagt er størsta hóttan fyri friði í heiminum. Í løtuni svølta russar, teir eru fyrst og fremst eyðmýuktir av at teirra samfelagsskipan, kommunisman fór á húsagang, síðan hevur vesturheimurin spælt hástórur, nú russar fíggjarliga liggja á knøunum. Tyskarar er tað fólkið í heiminum, sum ger størstu íløgurnar í Russlandi. Teir vita av egnum royndum, hvat ein fátækur russi hevur at siga.

Øldin stóra, tann tjúgunda hveppir sær, nú er lítið eftir. Skjótt letir hon eyguni aftur og vit leggja minnini á eygnalok hennara. Nógv avrikaði hon og seint verður hon gloymd. Mjúk eru minnini, sveipt um tey beisku. Og framtíðin, hon er ikki hvat hon hevur verið

Kanska um hundrað ár
fellir ein ungmoy tár
yvir teir frægu, ið
fullu í randargný,
kanska av summardá
sóljum og baldursbrá
bindur hon farnum krans,
áðrenn hon fer í dans

J.H.O. Djurhuus (1929)



# Hugleiðingar um aldarskiftið

*Evnið til hugleiðingarnar hevur ikki verið bundið. Einasta kravið var, at hugleitt skuldi verða um ársskiftið. Tað eydnaðist okkum tíverri ikki at fáa hugleiðingarnar hjá Jenisi av Rana við áðrenn nýggjár og tí prenta vit tær nú*

## Eitt vita vit um nýggju øldina - Hann er har!



Hvat fer komandi árið at bera okkum? Ei undur í, at so verður spurt við byrjanina til nýggju øldina. Skulu vit spent bíða, er orsøk at óttast ella skulu vit gleðast? Hava tey rætt, sum vænta tað ringasta, tey, ið hava brúkt tíð og orku at fyrireika seg til verju móti tí ókenda?

Eitt kent citat millum trúgvandi seinast árini ljóðar soleiðis: stúr ikki fyri morgindegnum, Guð er longu har! Gud er longu har.

Vit vita um stórar politiskar avgerðir, ið fara at verða tiknar komandi árið, um nú fjalt ríkidømi, sum fer at vísa seg ella kanska ikki, um longu fráboðaðar lógarbroytingar, sum fara at ávirka dagliga lívið, umframt tær enn ókendu. Eg hugsi m.a. um: endaligu avgerðina um framtíðarstøðu okkara (sum hvør einstakar eigur sína atkvøðu í) møguliga oljuævintýrið (sum neyvan bert førir gott við sær) fráboðaðar skattalættar nýggjar pensiónslógir og vit kundu hildið á við øllum tí, ið bíðar fyri framman.

Men í øllum hesum ókenda eiga vit hesa trygdina- Gud er longu har- og hann er trygd teirra, ið seta álit sítt á Hann. Hann er trygd samfelsagsins, familjunnar og einstaklingsins, hvat so enn fjalir seg handan ártúsundsýnið!

**Vónir og ynski fyri komandi árið.**

Úr útheimi koma árin, syngja vit í einum av vøkru sangum okkara. Bøn okkara má verða, at vakra og ríka tjóð okkara verður vard móti spilluni.

Enn er hitt ófødda uttan ta verju, sum annars verjir teg og meg móti ágangi. Lat okkum saman virka móti hesari hóttanini móti tjóð okkara.

Enn vendir politiska raðfestingin mangan øvugt- eftir Miðfloksins tykki. Vit fara at virka fyri at samfelagsins veiku verða prioritera í fremstu røð. Og vit fara óbroytt at minna á, at Skaparin ynskir ein aktivan leiklut í tilveru okkara- hjá tí einstaka, í familjuni og í samfelagnum.

Verður ár 2000 tað árið, tá dyr verða opnaðar fyri honum, ja so hava vit almikið at gleða okkum til.

f.Miðflokkin

Jenis av Rana

# Fundur um sosialu pensiónina í MBF-húsinum 30.12.99

Á fundi í starvsnevndini í MBF í dag kom nevndin til hesa niðurstøðu: at heita á Løgtingið og Trivnaðarnevndina, um at seta í gildi aftur ta gomlu pensiónslógina. Vit meta, at hendan nýggja lógin er ónýtulig, og átti hon ikki at verði sett í gildi í verandi líki.

Tað er ikki hissini, so skelkaði fólk, ið fáa avlamispensión eru, nú tey síggja, hvussu nógv niðurskorin tey eru, síðan tann nýggja pensiónslógin er komin í gildi. Hetta er úrslit av, sum løgtingsmenn sjálvir siga, at løgtingið hevur skrumblað ásetingarlógina ígjøgnum til samtyktar, uttan at hava sett seg inn í, hvat úrslitið vildi verða.

Lógin, ið skuldi gerast lættari at umsita, er í dag so torskyld, at ongin finnur hvørki høvd ella hala í henni.

Tey, ið hava mist nógv av sínari pensión, hvar skulu hesi fólk fara, nú tað manglar í til fastar útreiðslur.

Ein broyting, ið gjørd varð í pensiónslógini í summar var, at avlamisveitingin, ið fólk við breki, sum eru í vunnu higartil hava fingið, er burtur. Hesa viðbót hava deyv, hoyribrekað og onnur, fingið sum kompensatión fyri brekað. Meirútreiðslurnar ið standast av brekinum, má tann brekaði nú sjálvur fíggja. Vit góðtaka ikki, at veitingin nú skal koyrast yvir forsorgarlógina, við tí øktu umsitingini, hetta vil føra við sær.

Starvsnevndin mótmælir, at tað verður gjørt munur á pensiónistum: Pensiónistar áðrenn 1.1.2000, fáa eina skiftisupphædd upp á 856 kr., um tey eru gift við ikki pensiónisti, meðan pensiónistar, ið koma til eftir handan dag, onki fáa. Vit meta framvegis, at líkarættur skal verða galdandi millum gift og ógift.

Álitið á politikararnar er fokið. Vit minnast t.d. øll orðini hjá Helenu Dam á Neystabø, tá hon segði, at sjúkrahúsjáttanin ikki kundi verða hægri, tí hon hevði valt at raðfesta pensiónirnar hægri. Hetta hevur hon fullan rætt til, men flestu pensionistar finna ikki hesa hækking nakra staðni, heldur tvørturímóti.

Tað er próvfast, (sí hjáløgdu skjøl) at avlamispensiónistar nú fáa millum 2-3.000 kr. minni útgoldið um mánaðin. Hækkingarnar, ið landsstýrið boðaði frá, vísir seg nú at vera ein hvørvisjón, tí hækkingin og meira afturat verður afturtikið í skatti. Starvsnevndin kundi hugsað sær at fingið at vita, hvar tær fráboðaðu 40-60 milliónirnar til pensiónirnar eru endaðar.

Vit halda, at Føroya Løgting eigur ábyrgdina av pensiónslógini, og ásetingarlógini, og heita tí á løgtingið um, at fáa hesi viðurskifti í rættlag beinanvegin.

Vegna starvsnevndina
Doris Hansen
Leila Solmunde
Henning Sørensen
Regin



Almannastovan

Uppgerð yvir avgreiddar veitingar

22.07.1999

4.01.2000



Uppgerð yvir avgreiddar veitingar

24.11.1999

22.12.1999

## Aftur ein forsmakkur av fullveldi?

Ja, hesaferð vóru tað so pensiónistarnir sum fingu ferðina!

Nú í langa tíð, hava vit bara hoyrt um, at pensiónistarnir skuldu fáa betri umstøður, pensiónirnar skuldu hækka munandi, men tað sum vit uppliva í hesum døgum er, at teir næstan hava mist svøvnin. Teir vita ikki síni livandi ráð, hvussu teir skulu fáa mat í munnin, tíansheldur hvussu teir skulu gjalda sínar føstu útreiðslur, heilivág og annað.

Meira peningur kundi ikki játtast til sjúkrahúsini t.d., tí nú áttu pensiónistarnir tørn!

Tað var ein jólagáva hjá teimum at fáa! - næstan allir pensiónistarnir hava fingið fleiri hundrað krónur minni, enn teir áður fingu. Hvat hugsa tit, okkara landstýrismenn- og kvinnur, høvdu tit fingið hesar endarnar at rokkið saman? Og hvussu tá ein milliard minni verður at deila?

Vit vilja átala, at tit ikki virða okkara gomlu, sjúku og brekaðu meira!

Ironiskt nokk, so var 1999 eldraár......

**Sosialistiskt Ungmannafelag í Vágum**
**v/ Kristoffur Gaardlykke**
**Rúni Olsen**
**Ragnhild Olsen**